Dagstovnurin við Løgmannabreyt:

# Børnini fingu íblástur frá listafólkum

**Týskvøldið 29. mai skipaði Dagstovnurin við Løgmannabreyt í Hoyvík fyri hugnakvøldi fyri foreldrum og børnum, sum fara í skúla eftir summarferiuna**

FRAMSÝNING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í sera hugnaligum umhvørvi savnaðust foreldur og børn á Dagstovnurin við Løgmannabreyt týskvøldið 29. mai til eina máltíð og eina framsýning av listaverkunum , sum børnini sjálvi høvdu gjørt. Eisini var tónleikaframførsla og sangur á skránni.

Tey elstu børnini hava verið sera virkin hetta seinasta árið, tey hava arbeitt við ymiskum verkætlanum og verið nógvastaðni og vitja stovnar og fyritøkur fyri at fáa innlit í hvussu hesi arbeiða. Tey hava t.d. vitjað borgmeistaran í Tórshavnar kommunu, Mjólkarvirkið, politistøðina, verið í skótahúsinum á Ternuryggi og á legu í Tjørnuvík. Eisini hava tey vitjað Torbjørn Olsen listamann og Listasavn Føroya, har tey fingu inspiratión til tey ymisku listaverkini, sum tey sýndu fram hetta kvøldið. Tey vitjaðu eisini í Hoyvíkar skúla, har tey øll fara at ganga eftir summarfrítíðina.

### Mennast í kreativum umhvørvi

Pedagogarnir á stovninum eru samdir um, at børnini mennast meira við at arbeiða seinasta árið við ymiskum verkætlanum, enn um tey fara í vanligan skúla sum seks ára gomul.

Stovnurin hevur í síni endamálsorðing at í samstarvi við foreldur og børn, skal stovnurin vera eitt gott stað at vera við góðum trivnaði og felagsskapi millum børn og starvsfólk og millum starvsfólkini. Eisini at børnini mennast í einum kreativum umhvørvi, og dentur verður lagdur á, at tey skulu uppliva náttúruna.

Dagstovnurin við Løgmannabreyt læt upp 1. apríl 2003 og er sostatt fýra ára gamal. Á stovninum eru tríggjar barnagarðsstovur við 18 børnum, harav ein er skúlastova við 21 børnum. Harafturat er ein vøggustova við 12 børnum. Íalt eru 69 børn á stovninum, og har eru tilsamans 16 starvsfólk, 6 pedagogar og 10 hjálparfólk. Allar stovurnar hava nøvn við íblástri úr havinum: Aldan, Glaðan, Bylgjan og Báran, umframt felagsrúmið, sum kallast Mølin. Leiðari á stovninum er Sofía Nattestad.



*Børnini, sum fara í skúla eftir summarferiuna. Aftasta rað f.v.: Karl Johan Mikkelsen, Bjørk Sørensen, Rúna K. Joensen, Pætur I. Jacobsen og Ragnar F. Dam*
*Miðraðið f.v.: Rói Sørensen, Maria Viðstein, Maria Hádal, Malan B. Zachariassen og Silja S. Hansen*
*Fremra rað f.v.: Fríði Fagraberg, Pauli N. Vang, Vár Dam, Eydna í Soylu, Tormóður P. Djurhuus, Súsanna Kruse, Eyð W. Fjalsbak, Johan N. Kass og Dávid Hentze.*



*Filip Rajani Hansen fer eisini í skúla í summar. Filip og Maria Weihe vanta á ovaru felagsmyndini*



*Tónleikur og sangur við Benjamin Petersen og Margretu á Rógvi*



*Margreta á Rógvi syngur saman við børnunum*



*Børnini fingu inspiratión frá kendum listafólkum til sína listaframsýning*



*Foreldur og børn til hugnaløtu á dagstovninum*